# Støðlafjalli

og skifta bæði antennuskipan, káplar og sendara út. Nú skuldi alt verið í lagi, greiðir Petur frá til Sosialin.

## Mjørki og kaffi

Klokkan var ikki meiri enn fimm minuttir yvir tólv, tá tyrlan hoyrdist koma inn eftir Borðoyarvík. Teir hjá Atlantsflogi hava tað við at vera stundisligir.

Hjá okkum í landi var einki annað at gera enn at fáa menn og útgerð niðan móti tyrlupallinum, soleiðis at vit ikki seinka ferðaætlanini hjá tyrluni. Við hjálpsemi ber so nógv til.

Tyrlan lendir og vit gera okkum klár at fara umborð. – Men nei, sigur flogskiparin Anfinn. – Vit kunnu ikki fara avstað beint nú. Mjørki er á Støðlafjalli!

Ætlanin hjá Sosialinum og Rás 2 var annars at gera eitt beinleiðis innslag til tíðindasendingina á middegi frá hægsta staði á Støðlafjalli, men tað fór so ikki í luftina tá, tí veðurgudarnir spældu okkum eitt puss.

Blíðskapinum hjá flogskiparum og avgreiðslumanninum í Klaksvík, Aksel Zachariasen bilti einki. – Kom, vit fara oman í húsið at fáa okkum ein kaffimunn, meðan vit bíða eftir betri líkindum, sigur Anfinn.

Ein slíkan kaldan dag í mars mánaði kemur ein kaffimunnur altíð væl við. Meðan heita kaffið frá Akseli fer niðurum, hyggja vit eftir vevmyndum av tyrlupallum kring landið, samstundis sum Petur roynir at fáa fatur á fólki á Skála fyri at kanna líkindini á Støðlafjalli.

- Ja, nú er púra klárt á Støðlafjalli, siga tey. Og enntá sól, sigur Petur við brosi á kinn.

Menn seta kaffikopparnar frá sær. Nú er at brúka lagaligu løtuna, og kvika sær niðan á. Nakrar fáar minuttir seinni eru vit á flogi.

## Tivandi prát

Niðankomnir á Støðlafjall hevur sólin kortini hug at kámast eitt sindur og mjørkin sæst nærkast, men hetta forðar kortini ikki tyrluflogskiparunum at seta seg trygt á kavaklædda vøllin her uppi í 510 metrar hædd.

Teir gera skjótt av: Meðan motorurin framvegis gongur, verða útgerð og amboð hjá R2 Net tikin í land, og Petur og Jan fara gangandi við skundi við øllum á hesum á baki, teir umleið 100 metrarnar til teirra R2 hús.

Tungt er at bera og undirlagið er bleytt, men einar fimm minuttir seinni er tann nýggja útgerðin komin til húsini og tann gamla er komin umborð aftur á tyrluna.

Tíðindamaðurin frá Sosialinum og Rás2 fær stundir til eitt lítið og tivandi prát við Petur Jacobsen, áðrenn tyrlumotorurin byrjar at ganga so hart og týðiligt, at her er eingin ivi um, at Anfinn & Co ætla sær á flog aftur. Ein møguleiki var at ganga oman aftur á Gøtueiði, men hesin møguleikin at síggja Eysturoy og Norðoyggjar úr luftini einaferð enn, verður ikki kastaður soleiðis aftur við borðinum.

Myndamaðurin hjá Sosialinum, Ólavur hevur sett seg væl fyri uttast við vindeygað. Hann vil hava nakrar góðar landslagsmyndir – helst vildi hann tikið tær gjøgnum opnar dyr, men tað er ikki lógligt, fær hann at vita. So tað verður gjøgnum vindeyguni.

Tað mundi kortini ikki bilað tað stóra, um ein skal ganga eftir myndafrásøgnini sum um vikuskiftið varð løgd út á Portalin og tær myndirnar sum eru at síggja á hesi síðuni.

Jú, Føroyar eru eisini vakrar úr luftini!



Bæði Petur og Jan Jacobsen eru tøkniliga sinnaðir og vita tí, hvat krevst til at skifta bæði sendiútgerð, antennuskipan og káplar út



Nevndarformaðurin í R2 Net, Jan Jacobsen, má eisini taka sítt tak í við at fá útgerðina uppá pláss



Sendiútgerðin hjá R2 Net er á Støðlafjalli og tryggjar at lurtararnir á Skála og aðrastaðni kring landið kunnu hoyra sendingarnar á Rás 2